# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Veljarararnir hava greitt víst á, at teir vilja hava annan av teimum ymiskum møguleikum*
*(Nicolas Sarkozy)*




# Teir myrdu Alexander Litvinenko

Bretska løgreglan sigur seg nú vera vísa í, hvør tað var, sum beindi fyri fyrrverandi russiska KGB-manninum Alexander Litvinenko í London í november í fjør. Í hvussu er er Scotland Yard til reiðar at biðja russisku løgregluna og Interpol handtaka Vyatcheslav Sokolenko, Andrej Lugunov og Dmitry Kovtun, skrivar The Daily Mail. Teir tríggir hava arbeitt í russisku trygdartænastuni.

# Sarkozy ella Royal

**Næsti franski forsetin fer at eita Nicolas Sarkozy ella Ségoléne Royal**

Fronsku veljararnir, sum vóru óvanliga nøgvir í tali á forsetavalinum í gjár, lótu ongan iva vera um, at teir vilja hava annaðhvørt tann konservativa Nicolas Sarkozy ella sosialistin Ségoléne Royal at loysa Jacques Chiorac av.

Sum væntað fekk Sarkozy flestar atkvøður, og hann endaði á 31,11 prosentum. Tað kom heldur ikki óvart á nakran, at Royal fekk næstflestar atkvøður við sínum 25,84 prosentum.

Miðflokkamaðurin Francois Bayrou, sum eitt skifti sá út til at kunna hótta tey bæði oddavalevnini, fekk 18,55 prosent í gjár, og tann víðgongdi høgramaðurin Jean-Marie Le Pen fekk 10,51 prosent.

- Við at geva mær flestar og frú Royal næstflerstar atkvøður hava veljararnir greitt boðað frá, at teir vilja hava eitt avgerandi orðaskifti um tvær ymiskar hugsjónir, tvey ymisk samfeløg ogt tvær ymiskar skipanir, segði Nicolas Sarkozy á høvuðsstøðini hjá konservativa UDF-flokkinum í París, tá tað var greitt, at forsetavalið kemur at standa ímillum hann og Ségoléne Royal.

### Sarkozy vinnur

Seinna valumfar verður um 6. mai, og longu nú hava kanningarstovurnar kannað, hvat av teimum báðum valevnunum hevur bestu møguleikarnar at fáa tann neyðuga meirilutan tá. Tvær kanningar eru gjørdar. Onnur sigur, at Nicolas Sarkozy fer at vinna við 54 prosentum ímóti 46, og hin sigur, at hann fer at vinna við 52 prosentum ímóti 48. Sama kanning vísir, at teir flestu veljararnir hava í hvussu er gjørt av, hvør av teimum báðum fær krossin tann 6. mai. Heili 88 prosent siga, at tey hava tikið ta avgerðina.

Eygleiðarar siga, at valluttøkan kann fáa stóran týdning. Í gjár var hon óvanliga stór. Sambært innanríkisráðnum í París vóru 84,6 prosent av veljarunum og valdu, og tað er tað mesta í meiri enn fýrati ár. Politiskir eygleiðarar í Fraklandi siga, at tað eydnaðist Sarkozy og Royal at fáa ávikavist teir konservativu og teir sosialistisku veljararnar í valhølini, og at tað fekk avgerandi ávirkan á úrslitið.

Eygleiðararnir halda, at miðjumaðurin Francois Bayrou kann vera nøgdur við undirtøkuna, sum hann fekk í gjár. Hinvegin er lítil ivi um, at Jean-Marie Le Pen man vera sera vónsvikin, tí hann hevði eitt stak vánaligt val.

## STUTT SAGT

### Børn seyma klæðir

Bretska blaðið The Observer sigur seg hava avdúkað, at nakrar seymistovur í indiska høvuðsstaðnum New Dehli noyða børn at seyma klæðir, sum verða seld í bretskum klædnahandlum. Blaðið sigur seg hava funnið seymistovurnar í Haryana-býarpartinum. Á einari seymistovu, sum blaðið fann, sótu børn og seymaðu summarkjólar til bretsku handilsketuna Select. Ein av dreingjunum á seymistovuni var 11 ára gamal. Leiðarin fyri Select-handilsketuni sigur við The Observer sigur seg vera ovfarnan av tíðindunum í blaðnum. Hann sigur, at umboð fyri Select hava verið í India fyri kortum, og tey fingu ta uppfatan, at alt var, sum tað eigur at vera, sigur hann.

### Bíða eftir Harry

Uppreistrarbólkar í Irak hava lagt ætlanir um at burturflyta bretska prinsin Harry, tá hann kemur til Irak sum hermaður í næsta mánað. Tað skrivar The Obersver. Sambært blaðnum hava einstakir bólkar sagt, at teir hava góðar keldur í bretska herliðinum í Irak, og at teir fáa allar neyðugar upplýsingar haðani. Bretska herleiðslan hevur sagt, at Harry skal gera tænastu í Maysan-landspartinum, har tað hevur verið rættiliga ófriðarligt seinastu tíðina.

### Oljudálking

Olja frá kýpriska ferðamannaskipinum „Sea Diamond", sum sakk við griksku oynna Santorini herfyri, hóttir nú við at dálka umhvørvið har. Grikska myndugleikarnir løgdu oljubyrgingar rundan um vanlukkustaðið fyri at forða fyri dálking, men tað hevur ikki víst seg at vera nóg mikið. Blaðið Ethmos skrivaði um vikuskiftið, at olja hóttir við at dálka strendurnar á Santorini, sum árliga fær vitjan av fleiri hundraðtúsund summargestum. Sambært teimum, sum áttu ferðamannaskipið, vóru umleið 450 tons av olju í tangunum, tá skipið sigldi á ein flúr og sakk. Vanlukkan kravdi tvey mannalív.